

## »Damaskus, arabiski mentanarhøvuðsstaðurin 2008«

Meðan støðan í Gasa hevur tikið nógv pláss í arabiskum fjølmiðlum í farnu vikuni, so var ein stórsligin mentanarfagnaður settur seinasta vikuskifti á Ummayya-torginum í Damaskus. Ein av mongu luttakarunum er kenda libanska songkvinnan Fairouz. Hendan er heimskend í arabiska heiminum og savnaði sum eingin annar libanska fólkið í tungu árunum frá 1975 til 1990, tá ið borgarakríggið var í landinum. Tí er tað ikki annað enn natúrligt, at kjak í Libanon hevur tikið seg upp um hvørt tað er rætt ella skeivt av henni at luttaka í Damaskus. Í stóra blaðnum al-Hayat fanst tann eini skribenturin at røddum, ið vóru ímóti luttøkuni hjá Fairouz. Hann legði dent á, at hon ikki vitjar eitt harðrent stýri. Men heldur, at hon luttekur á einum tiltaki, ið fagnar arabiskari mentan og samstundis gevur sýrisku stjórnini friðarboð, ið siga meiri enn »túsund blaðgreinar og politiskar røður.«




# Libanski knúturin

**Libansku politikararnir kunnu ikki semjast um, hvussu valdið og tingmanna-býtið skal býtast. Í farnu viku varð valið av libanska forsetanum útsett – fyri 13. ferð!**

## Miðeystur



**Johan Jacobsen**
johan@sosialurin.fo

Meðan føroysku floksleiðararnir hava skund at skipa samgongu, so er støðan ein onnur í Libanon. Landið hevur síðan midnátt 23. novembur ´07 verið uttan forseta og í einari politiskari undantaksstøðu. Libansku floks-leiðararnir hava verið sera varnir við at geva seg í samráðingunum, sum eru farnar fram. Og sambært libanskum eygleiðarum, so kann hendan støðan halda sær í eitt ár fram ella so – eingin av teimum stóru flokkunum missir stórvegis vald sum støðan nú fyriheldur seg, og partarnir tykjast vera sinnaðir at bíða heilt til valið, sum verður í mai 2009. Um so verður fer tíðin at vísa, næsta høvið at velja forseta og skipa tingið er sett at verða 13. februar. Í øllum førum fór skrivarin í Arabisku Liguni, Amr Moussa, ið hevur roynt at fáa partarnar at røkka eini semju, seinasta vikuskifti til Cairo, uttan at vita nær hann koma aftur til Beirut at royna fleiri samráðingar.

Men hvør er so trupulleikin? Tað er ikki so nógv forsetaval-evnið, ið er trupulleikin. Hann er funnin. Partarnir eru samdir um Michel Suleiman generalur skal innstillast. Heldur er tað ein røð av øðrum viðurskiftum, ið hava við tingmannabýtið at gera, sum liggja tvørt fyri.

### Hagtølini, ið eingin torir at savna

Í Libanon hevur mann gingið út frá eini fólkauppteljing frá 1932, tá ið mann hevur skipað landsins valdsbýti. Hendan fólkauppteljingin segði, at tey kristnu høvdu ein meiriluta. Av hesi staðfesting bleiv tað til eina »gentleman´s agreement« ella eina politiska siðvenju, at forsetin skuldi verða kristin maronittur, tingformaðurin shiamuslimur og forsætisráðharrin sunnimuslimur. Og líka síðan hava hesi hagtøl verið eitt eymt punkt. Men hetta bleiv broytt í 1990, eftir eitt 15 ára langt borgarakríggj. Tá samdust partarnir um eina aðra skipan, »Ta´if Avtalan«, ið býtti valdið heldur javnari út. Gjøgnum 90ini er tað hent, at shiamuslimarnir og Hizballah undir leiðslu av Nasrallah er komin longri inn í politiska hitan í Beirut. M.a. av hesum hevur eitt stríð tikið seg upp millum shia- og sunnimuslimar. Tað er ein sannroynd, at shiamuslimar er tann størsti trúarbólkurin í Libanon í dag – umleið 1/3